Húsamekling

www.husamekling.fo

Keyp og søla av fastari ogn tel 31 93 21



## Í Líðini, Kollafjørður

**Stødd á húsum:**..............Uml. 106 m² + 100 m²
**Stødd á grundøki:**..........456 m²
**Byggiár:** ..........................1975
**Prísuppskot:**...................kr. 1.600.000,-



## Íslandsvegur 39, Tórshavn

**Stødd á húsum:**...............175 m² x 2
**Stødd á grundøki:**..........350 m²
**Byggiár:** ..........................1966
**Kostnaður:** .....................Hóskandi boð ynskist



## Á heygnum Mikla, Tórshavn

**Stødd á húsum:** .............89,6 m² x 2
**Stødd á grundøki:**..........Uml. 300 m²
**Byggiár:** ..........................2007
**Kostnaður:** .....................Hóskandi boð ynskist



## Við Sjógv, Strendur

**Stødd á húsum:**..............60 m² + kjallara og loft
**Stødd á grundøki:**..........1000 m²
**Byggiár:** ..........................Uml. 1920
**Kostnaður:** .....................Hóskandi boð ynskist



## Oyggjarvegur 10, Tórshavn

**Stødd á húsum:** 81 m², kjallari 63 m², bilhús: 49,4 m², hjallur: 15,5 og úthús 13,6
**Stødd á grundøki:**..........1714 m²
**Byggiár:** ..........................1959
**Kostnaður:** .....................Hóskandi boð ynskist




## Traðartún 2, Argir

**Stødd á húsum:**
**Stødd á grundøki:**..........uml. 657 m²
**Byggiár:**
**Prísuppskot:**...................kr. 1.600.000,-


# Leiðari til Drotning Ingridar Meinigheitsbarnagarð



Í Drotning Ingridar Meinigheitsbarnagarði arbeiða 13 starvsfólk. Í barnagarðinumeru 34 barnagarðsbørn og 34 frítíðarskúlabørn.

Vit eru ein meinigheitsbarnagarður og arbeiða í løtuni við broytingum, har hetta fer at seta størri dám á gerandisdagin.

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, sum verður stjórnaður av eini níggjumannanevnd, har limirnir umboða meinigheitsráðið í Vesturkirkjuni, Meinigheitshúsið, KFUK, KFUM og Býráðið, umframt at prestur, lækni og tvey foreldraumboð eru í nevndini.

**Søkt verður eftir leiðara til Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarð. Starvið verður sett so skjótt sum til ber, men vit bíða fegin eftir rætta leiðara.**

### Vit bjóða
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv
- eitt starv, har tú kann menna teg, bæði fakliga og persónliga
- rúm fyri nýhugsan
- góðar og álítandi starvsfelagar

### Við vænta at tú
- ert útbúgvin pedagogur
- hevur hug at arbeiða við leiðslu
- hevur førleika at umsita bæði fakliga og fíggjarliga
- dugir væl at samskifta, bæði innan og uttanhýsis
- gongur á odda og tekur ábyrgd
- dugir væl at samskipa
- hevur hugsjónir um virksemi á stovninum
- dugir at geva bæði børnum og starvsfólkum íblástur
- virkar fyri trivnaði hjá børnunum, til tess at menna tey evni og teir møguleikar, hvørt einstakt barn hevur
- dámar væl avbjóðingar og sær møguleikar heldur enn forðingar
- tekur undir við kristnu virðunum

### Setanarviðurskifti
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Starvið er lønt á lønarstigi 21, 23, 25, 27.

### Meiri at vita
um starvið við at venda sær til Sverra Steinhólm, formann í nevndini, á telefon 210773 ella Maju Jakobsen, telefon 316007.

### Umsókn
saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu verða send

**Drotning Ingridar Meinigheitsbarnagarði**
Att. Sverri Steinhólm · Jóannesar Paturssonargøta 13 · 100 Tórshavn

og vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. apríl 2007 á middegi.



# DEILDARLEIÐARI FYRI LØGDEILDINA Í FISKIMÁLARÁÐNUM

**Okkara leiðandi løgfrøðingur fer í annað starv, og verður starvið sum deildarleiðari fyri Løgdeildina tí lýst leyst til setan skjótast møguligt.**

Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum løgfrøðingur, duga væl at samstarva og eisini tora at vera í sjálvdrátti.

**Høvuðsuppgávurnar í starvinum eru**
- at veita løgfrøðiliga ráðgeving innan fiskivinnumál, sjóvinnumál og tilbúgving,
- at hava løgfrøðiligu ábyrgdina í sambandi við arbeiðið at tilevna uppskot til lógir, kunngerðir v.m. innan fiskivinnuøkið, tilbúgving og aðra løggávu á sjóvinnuøkinum,
- at veita løgfrøðiliga ráðgeving í sambandi við sakarmál, ið antin er lagt ímóti ella av Fiskimálaráðnum, um eitt mál eigur at kærast v.m.,
- at umsita onnur mál hjá Fiskimálaráðnum, har mett verður neyðugt við løgfrøðiligari viðgerð, antin við sjálvstøðugari málsviðgerð ella saman við øðrum løgfrøðingum uttan fyri ráðið,
- at vera skipaskrásetari,
- at mynda leiðsluna í Fiskimálaráðnum í breiðari høpi.

Setanarviðurskifti
Starvið verður lønt sum deildarleiðari I sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Starvsøkið fatar um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskimálaráðið.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.
Umsókn við avriti av prógvum, lívsgongdarlýsing og øðrum kann sendast til:

**Fiskimálaráðið**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**
**T-postur: fisk@fisk.fo**

Umsóknin skal vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi týsdagin 24. apríl 2007, klokkan 16.00.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Rógva Reinert, aðalstjóra, ella Hera Joensen, deildarleiðara á telefon 353030.
Fleiri upplýsingar um Fiskimálaráðið eru á heimasíðuni www.fisk.fo.

www.fisk.fo

VIT DRAGA EINA LÍNU - VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI - VIT VILJA VITA - VIT BRÓTA SLÓÐ

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umsitur málsøkini fiskivinna, sjóvinna og tilbúgving. Fiskimálaráðið vegleiðir landsstýrismannin, soleiðis at avgerðirnar eru rættar og haldgóðar. Ráðið fyrireikar lógir, kunngerðir og reglugerðir, og hevur eisini eftirlit við, at ásettar reglur verða fylgdar. Somuleiðis røkir ráðið samskipandi uppgávur innan málsøkið hjá landsstýrismanninum, og tekur lut í millumlanda samráðingum, altjóða fiskiveiði- og sjóvinnufelagsskapum umframt norðurlendskum samstarvi.*